# Útvarpið og Sjónvarpið mennast fyri 20 milliónir

**Sjónvarpið skal hava útgerð, so tað kann senda beinleiðis frá hendingum kring landið, og Útvarpið skal tryggja sítt savn. Tað eru nakað av tí, sum liggur í arbeiðnum at digitalisera loftmiðlarnar. Landsstýrismaðurin við mentmálum biður nú um heimild frá løgtinginum at brúka 20 milliónir krónur til hesar útbyggingar**

LOFTMIÐLAR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Útvarpið og Sjónvarpið skulu næstu árini útbyggja tøkniliga fyri samanalagt 20 milliónir krónur. Landsstýrismaðurin við mentamálum biður løgtingið um heimild til hesa útbygging*

Digitaliseringin av Útvarpinum og Sjónvarpinum skal nú gerast liðug. Tað heldur landsstýrismaðurin við mentamálum, sum hevur lagt uppskot fyri løgtingið um digitalisering av almenna loftmiðlastovninum.

Í uppskotinum biður Jógvan á Lakjuni um heimild at digitaliserað Útvarpið og Sjónvarpið fyri í mesta lagi 20 milliónir krónur.

Tað verður mett, at Útvarpið hevur tørv á umleið seks milliónum krónum fyri at gera sína digitalisering lidna, meðan Sjónvarpið skal brúka einar 14 milliónir krónur.

Landsstýrismaðurin ætlar tí at brúka fimm milliónir krónur um árið fram til 2008 fyri at gera digitaliseringina av Útvarpinum og Sjónvarpinum lidna.

### Løgtingið steðgaði játtan

Útvarpið fór undir sína digitalisering miðskeiðis í nítiárunum, meðan Sjónvarpið byrjaði í 2001.

Í árunum frá 2001 til 2003 vóru játtaðar samanlagt 12.6 milliónir krónur til hesa tøkniligu menning, men í fjør steðgaði løgtingið játtanini, tí hon vildi hava eina løgtingslóg at halda seg til og ikki bara játta pengar yvir fleiri fíggjarár.

Hendan løgtingslóg er nú borin í løgtingið sum uppskot.

– Endamálið við lógini er at fáa politiska undirtøku fyri liðugtgerð av digitaliseringini av Útvarpi og Sjónvarpi Føroya. Við eini slíkari verklagslóg ber til hjá landsstýrismanninum at tilrættaleggja virksemið fyri fleiri fíggjarár, og hevur landsstýrismaðurin sostatt heimild til at gera avtalur, ið fevna um fleiri fíggjarár, sigur Jógvan á Lakjuni í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

### Goymslan skal tryggjast

Útvarpið hevur í eini 10 ár arbeitt við at digitalisera sína framleiðslu. Hetta merkir millum annað, at øll framleiðsla av sendingum og øðrum fer fram á teldu og verður goymd talgild.

Fyrstu árini varð útbygt í smáum, men við játtanini á fíggjarlógini árini 2001 til 2003 kom rættilig gongd á útbyggingina. Tá fekk Útvarpið umleið tríggjar milliónir krónur til arbeiðið, og játtanin varð millum annað brúkt til at digitalisera tey flestu av upptøkuhølunum og at gera nýggjar støðir til redigering av upptøkum.

Nú verður mett, at tað kostar einar seks milliónir krónur at gera arbeiðið í Útvarpinum liðugt, og hesir pengar skulu millum annað brúkast ein net, sum skal knýta saman tær digitalu eindirnar í Útvarpshúsinum, at digitalisera studio 1, sum er samantvinna við Útvarpshøllina, og at keypa ein nýggjan upptøkubil, sum skal brúkast sum kontrollrúm í Útvarpshøllini og til at gera upptøkur uttanfyri húsið.

Harafturat verður eisini arbeitt við at digitalisera savnið hjá Útvarpinum og at hava neyðuga trygd í tí sambandi.

### Vilja kunna senda beinleiðis kring landið

Digitaliseringin av sjónvarpinum byrjaði í 2001. Í fyrstu verkætlanini varð dentur lagdur á redigering, og seks nýggj digital redigeringsrúm vórðu gjørd.

Næsta verkætlanin fevndi um eitt servararúm og eitt sendirúm. Servararúmið knýtir allan telduteknikkin í sjónvarpshúsinum saman. Sendirúmið er ein tekniskur miðdepil, og um hendan miðdepil fer alt tilfar, ið verður sent, og alt tilfar, sum verður móttikið um fylgisvein.

Ætlanin var at gera sendirúmið liðugt í 2004, men av tí, at játtan ikki fekst, er henda eindin ikki tikin í brúk enn, og tí skal ein partur av teimum 14 milliónunum, sum Sjónvarpið hevur brúk fyri, brúkast til at gera nýggja sendirúmið liðugt.

Millum alt annað, sum Sjónvarpið skal brúkast pengar til, er ein nýggjur upptøkubilur, sum bæði kann brúkast sum kontrollrúm í Sjónvarpnum og samskipa upptøkur uttanfyri húsið. Verandi upptøkubilur er 20 ára gamal og í ringum standi.

Ein onnur ætlanin er at keypa ein sonevndan SNG-bil, sum ger tað gjørligt at senda umvegis fylgisvein til sjónvarpshúsið í Vørðsluni. Hetta vildi gjørt tað møguligt hjá Sjónvarpinum at senda beinleiðis frá hendingum ella tiltøkum kring landið.

### Rationalisera

Ein av fremstu málunum við eini digitalisering av almennu loftmiðlunum er at gera teir tíðarhóskandi í einum nýggjum sjónvarpsheimi, har tann digitala tøknin stendur í miðdeplinum.

Landsstýrismaðurin við mentamálum sigur tó eisini í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at eitt annað av endamálunum er at rationalisera umsitingina av stovnunum og og programmframleiðsluni.

## Trøllabundin av Eivør

**Nýggja útgávan hjá Danmarks Radio Big Band við Eivør Pálsdóttir sum solisti er nú komin út. Útgávan hevði selt 5000 eintøk longu áðrenn útgávudagin**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*

Eivør Pálsdóttir er aftur aktuell á nýggjari fløguútgávu. Hesaferð er hon solistur á eini fløgu hjá heimskenda danska orkestrinum, Danmarks Radio Big Band.

»Trøllabundin« kallast útgávan, sum mánadagin komu í sølubúðirnar, og tað er fyrst og fremst tónleikur hjá Eivør Pálsdóttir, ið er at finna á fløguni. Sterka røddin hjá Eivør fær góðan stuðul frá tí vælspælandi bigbandinum, og tað hugtekur eisini ummælaran hjá tónleikablaðnum Gaffa.

– »Trøllabundin« vísir eina aðra stíðu av talentinum hjá Eivør enn hennara útgáva fyri trimum mánaðum síðani, sum var merkt av country og fólkatónleiki. »Trøllabundin« vísir hinvegin eina Eivør, har fólkatónleikurin er ein frumkraft, sum brennur í kroppi og sál, og sum hevur gott av mótspælinum frá DR Big Band, skrivar ummælarin Peter Studstrup.

Hann heldur, at ikki minst sangurin »Nú brennur tú í mær« fer at gera konsertirnar við Eivør og DR Big Band verdar at uppliva.

Hósdagin í næstu viku byrjar á konsertferðin hjá teimum í Danmark. Tey leggja fyri í Frederiksværk, og síðani gongur leiðin til Føllenslev, Næstved, Keypmannahavn, Århus, Halkær og Aalborg.

Seinni fara Eivør og Big Bandið á konsertferð í øðrum europeiskum londum.

# Loftmiðlar mugu fylgja við tøkniliga

**– Um vit skulu hava almennar loftmiðlar, so mugu teir eisini verða við í tøkniligu menningini, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður**

ÚTBYGGING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, legði beint undan freistini fyri framløgu í løgtinginum eitt uppskot fram um digitalisering av almennu loftmiðlunum.

Í uppskotinum verður staðfest, at fram til 2008 skulu brúkast 20 milliónir krónur til at moderniserað tøknina hjá Útvarpinum og Sjónvarpinum.

– Um vit skulu hava almennar loftmiðlar, so mugu teir eisini verða við í tøkniligu menningini, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum.

– Digitaliseringin í Útvarpinum og Sjónvarpinum byrjaði fyri fleiri árum síðani. Útvarpið er komið nakað longri enn Sjónvarpið, men nú skal arbeiðið gerast liðugt. Tað verður mett, at stovnarnir klára ikki hesa útbyggingina sjálvir, og tí er neyðugt við serligari játtan.

### Neyðugar útbyggingar

Jógvan á Lakjuni vísir á, at fíggjarnevndin hjá løgtinginum hevur kravt at fáa eina meira neyva ætlan fyri útbyggingarnar í Útvarpinum og Sjónvarpinum, um pengar skulu játtast á fíggjarlógini, og tað er fyri at lúka hetta krav, at nýggja lógaruppskotið er lagt fyri tingið.

Løgtingið hevur játtað fimm milliónir krónur til útbyggingarnar í 2005 við teirri treyt, at eitt lóg verður løgd fyri løgtingið, og tað er hon nú.

– Alt gongur móti digitalisering, og tí eru útbyggingarnar hjá Útvarpinum og Sjónvarpinum neyðugar, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður.

## Teitur til USA

Teitur Lassen, sum í hesum døgum er við at gera enda á einari konsertferð til fleiri europeisk lond, fer seinni í hesum mánaðinum at spæla í USA.

Tríggjar konsertir eru komnar á skránna í USA, og tær verða í New York 15. mars, Austin í Texas 18. mars og í Los Angeles í California 23. mars.

**ek**